# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Obama hevur ringt til mín. Pápi hansara var pápabeigg í mín, so vit eru systkinabørn*
*(Raila Odinga, andstøðuleiðari í Kenya)*

# Bush á Vestara Áarbakka



*Ta amerikanski frosetin, George W. Bush, kom til Ramallah á Vestara Áarbakka í dag, var tað fyrsta vitjan hansara í teimum palestinsku økjunum. Í Ramallah hitti Bush palestinska forsetan, Mahmoud Abbas, og teir báðir umrøddu støðuna og tað, sum kom burtur úr fundinum í Jerusalem í gjár millum Bush og ísraelsku stjórnina. Amerikanski forsetin hevur sett sær sum mál at fáa eina friðaravtalu í Miðsyestri, áðrenn hann fer frá um eitt ár.*

# Edwards gevst ikki so



*John Edwards við konu og børnum á veljarafundi í New Hampshire*

**Hóast hann ikki hevur vunnið enn, hevur John Edwards ongar ætlanir um at gevast við uppstillingini**

-Vit hava verið í tveimum statum, men vit hava 48 eftir enn, segði ein bjartskygdur John Edwards, tá hann takkaði sínum stuðlum í New Hampshire. Eygleiðarar ivast tó ikki í, at hann var vónsvikin av úrslitinum har. Edwards fekk 17 prosent av teimum demokratisku atkvøðunum og sostatt nógv minni enn Hillary Clinton og Barrack Obama, sum fingu ávikavist 39 og 36 prosent.

Jon Tippi, sum er ráðgevi hjá John Edwards, sigur við New York Times, at trý fólk fara at kappast um uppstillingina hjá demokratunum. Tann næsti dysturin verður í South Carolina, har teir svørtu veljararnir hava nógv størri ávirkan enn í Iowa og New Hampshire. Sjálvur er John Edwards úr grannastatinum North Carolina, men kanningar vísa, at hann er væl aftan fyri Hillary Clinton og Barrack Obama í South Carolina, har valið verður tann 26. januar. Kortini halda eygleiðarar, at John Edwards kann fara at gera vart við seg í Suðurstatunum.



*Løgreglan leitar við bátum í ánni eftir teimum fýra børnunum*

*(Mynd: AP)*

# Pápin tveitti børnini í ánna

**Ein 37 ára gamal maður í Alabama í USA hevur viðgingið, at hann tveitti síni børn av einari brúgv niður í ánna**

Síðani í gjár hava løgreglumenn og kavarar í Alabama leitað eftir Ryan, Hannah, Lindsey og Danny, sum vóru ávikavist trý, tvey, eitt og fýra mánaðir.

Myndugleikarnir vænta ikki at finna nakað av børnunum á lívi, eftir at pápi teirra, Lam Loung, hevur viðgingið, at hann tveitti børnini út av einari brúgv og niður í ánna. Fallið er umleið 25 metrar, skrivar AP.

Lam Loung er pápi at trimum av børnunum, men ikki trý ára gamla Ryan, og løgreglan heldur, at hann beindi fyri øllum børnunum fyri at hevna seg inn á konu sína.

Tað var pápin sjálvur, sum boðaði løgregluni frá, at børnini vóru horvin. Tá segði hann, at barnagentan var farin við teimum, men undir avhoyringum viðgekk hann veruleikan.

## STUTT SAGT

### Stjólu heila brúgv

Myndugleikarnir í Russlandi standa sum Kánus, nú tað er avdúkað, at onkur hevur stolið eina heila brúgv á náttartíð, uttan at nakar varnaðist nakað sum helst. Brúgvin, sum er ella rættari sagt var úr stáli, vigar umleið 200 tons. Brúgvin var partur av vegakervinum í landspartinum Kharbarovsk og var millum annað bindilið til eitt orkuverk. Leiðslan á orkuverkinum sigur, at tað fer at kosta tvær ferðir so nógv at byggja eina nýggja brúgv sum ta horvnu. Men myndugleikarnir hava longu gjørt av at byggja eina nýggja. Men hon verður stoypt úr betong, siga teir.

### Krígsbrotsmaður tikin

Franska løgreglan hevur tikið ein mann, sum var yvirmaður í herinum í Rwanda, tá fólkadrápið var har í 1994. Fronsku myndugleikarnir siga, at tann nú 53 ára gamli Marel Bivugabagabo er á listanum við nøvnum á monnum, sum flýddu úr Rwanda aftan á fólkadrápið, og sum síðani hava verið eftirlýstir kring allan heimin ígjøgnum Interpol. 93 nøvn eru á hesum listanum. Marel Bivugabagabo varð tikin í franska býnum Toulouse herfyri, og hann hevur sitið í fronskum varðhaldi síðani.

### Írar drekka ov illa

Tey seinastu tíggju árini er alkoholnýtslan í Írlandi vaksin 17 prosent, og nú er støðan so álvarssom, at stjórnin í Dublin hevur sett eina nevnd at kanna, hví írar drekka so nógv verri nú enn fyrr. Ein orsøk, sum summi vísa á, er, at í dag ber til at keypa alkohol á hvørjum horni. Bara frá 2203 til 2005 vaks talið á kioskum, sum selja rúsandi løg, 35 prosent. Brian Lenihan, løgmálaráðharri, segði í gjár, at drekkingin er vorðin ein trupulleiki fyri írska samfelagið, og tí má kannast, hví so er.